## Mugu tosa um fiskivinnuna

Forkvinnan í grønlendska andstøðuflokkinum Siumut, Aleqa Hammond, vil hava landsstýrið at skipa fyri einari ráðstevnu, sum skal viðgera framtíðina hjá grønlendsku fiskivinnuni. Aleqa Hammond sigur, at fiskivinnan í Grønlandi stendur fyri stórum avbjóðingum bæði á nær- og fjarleiðum og bæði á sjógvi og landi. Tí heldur hon, at taqð er umráðandi at halda eina ráðstevnu, sum skal viðgera teir ymsu trupulleikarnar, og sum skal seta út í kortið, hvørja kós tann grønlendska fiskivinnan skal halda tey næstu árini.



## Ikki tíð til veðrið

Nógv bendir á, at USA fær ikki stundir til at røkka einari innanhýsis semju undan veðurlagsráðstevnuni í Keypmannahavn í desember. Tað er leiðarin hjá demokratunum í Senatinum, Harry Reid, sum hevur sagt, at tað er ikki serliga sannlíkt, at Kongressin fær tíð til at viðgera og avgreiða eitt so umfatandi mál sum veðurlagsbroytingarnar undan ráðstevnuni í Keypmannahavn. Reid vísir á, at Kongressin hevur úr at gera við at viðgera uppskotini hjá Barack Obama, forseta um sjúkratrygging og nýskipanir á heilsuøkinum.

# Nakin list í hvítum rúmi



*Tekningarnar hjá Nils Vollertsen og leirlutirnir hjá Vígdis Petersen skapa eitt sermerkt samspæl á framsýning í Stephanssons húsi*

**Ein sælur friður hvílir yvir hvíta rúminum í Stephanssons húsi, har listafólkini Nils Vollertsen og Vígdis Petersen í løtuni sýna fram sína merkisvert skroypiligu og naknu list**

LIST
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Eina løtu tykist tað, sum at hvíta kjallararúmið í Stephanssons húsi á Kongabrúnni er sett í undantaksstøðu frá býarlívinum uttanfyri. Naknu tekningarnarnar hjá Nils Vollertsen og frumkendu leirlutirnir hjá Vígdis Petersen hava tikið ein frið við sær inn, sum seta ferð á larmin av tínum egnu tonkum - ikki eitt vánaligt útgangsstøði fyri eina listaframsýning.

### Við svávulpinni og pappi

Á hvítu veggunum hanga ein røð av ráhvítu pappstykkjunum, sum Vollertsen hesuferð brúkar sum lørift. Við fyrsta eygnabrá tykjast papppettini meir at kalla tóm, men so hvørt, tú kemur nærri, varnast tú eitt tysjandi lív av rørslum onkuntíð í støðugum samspæli við nakrar næstan ósjónligar grønar plettir, sum samstundis toga hvítu bakgrundina enn longur fram .

Flestu tekningarnar ímynda fuglar á ein hátt, so tú gevst at hugsa um fuglin sum eitt djór við ávísum litum og í einum ávísum náttúruumhvørvi. Alt tað er skavað burtur, og eftir standa hábærsligu rørslunar, sveimandi, stokkutar og skroypiligar onkursvegna. Ikki sum fullfíggjaðar rørslur, men allatíðina á veg - eisini til eina nýggja rørslu í eini aðrari tekning á somu mynd, har onki er avgjørt frammanundan.

- Eg royni at geva myndini eitt so spontant úttrykk, sum til ber, millum annað við íblástri frá strukturinum í pappinum. Á hesum myndunum havi eg teknað við kol og brendum svávulpinnum, sigur Nils Vollertsen, sum eisini í aðrar mátar letur pláss vera fyri tí spontana.

Eitt nú er fýra ára gamla dótturin Katrine eisini sloppin at seta sítt fingramerki á fleiri av myndunum.

- Onkuntíð hevur hon snýkt seg at tekna sína egnu lítlu tekning inn í myndina. So í staðin fyri at skelda um tað, lati eg hennara tekningar blíva part av verkinum. Barnatekningar hava okkurt vælgerandi fremmant yvir sær, sum vit vaksnu ikki duga at eftirlíkna nóg sannførandi, heldur Nils Vollertsen, sum eisini letur tíðarinnar tonn sleppa upp í leikin.

- Summi av hesum papppettunum hava ligið nakað leingi í ljósinum, áðrenn eg byrjaði at tekna á tey. Har kann eg so brúka gulnaðu kantaranar til at geva myndini eina dýpd, sum annars kann vera trupul at raka, sigur listamaðurin.

### Goysandi list

Í hvíta rúminum ganga nærum provokerandi naknu myndirnar hjá Vollertsen inn í eitt áhugavert samspæl við leirlutirnar hjá Vígdis Petersen, sum standa á gólvinum. Eins og fuglarørslurnar, hava jørðlittu leirlutirnir okkurt tigandi hábærsligt yvir sær, okkurt organiskt og frumkent, har tilfar og aldukendar, hvørvandi rørslur geva verkunum lív.

- Mær dámar best at brúka rátt leir, sum fær anda frítt. Glasurin brúki eg oftast fyri at geva ruftlutu og poknutu flatuni eitt mótspæl og kanska eitt meir grafiskt útrykk, sigur Vígdis Petersen.

Listarliga samspælið við tekningarnar hjá Vollertsen kemur kanska serliga til sjóndar í eyðkendu strokunum í glasurinum, sum skifta støðugt millum skjótar og seinar rørslur.

Eisini í sjálvum skapinum er tað rørslan, sum fyrst fangar eygað í leirlutunum. Eitt nú í myrka grástríputa verkinum, sum leiðir tankarnar á ein hval, sum kavar og bert sveivin stingur upp undan.

- Tilfarsliga dámar mær eisini at mana fram kensluna av leivdum frá einum eldgosi. Sjálvt um eg fái nógvan íblástur frá Japanskari mentan og list, so haldi eg, at netupp í ráa tilfarinum sæst ein samanrenning millum tað japanska og tað norðurlendska, sigur Vígdis Petersen.

Í fleiri mátar tykist tilsipingin til eldgos eisini vera ein rámandi yviskrift til framsýningina hjá teimum báðum listafólkunum, har ein brádligur froysur skapar nýtt lív, nýggj skap og nýggjar mátar at eygleiða heimin.

Framsýningin í Stephanssons húsi letur aftur sunnudagin.